# Álitisfólkabólkar hjá Pedagogfelagnum 2020/22

**Endamál**

- Styrkjan av álitisfólkaskipanin
- Netverkan
- Tættari samstarv – millum álitisfólk og felagið

**Fundarskrá**

1. Í fundarinnkallingini skal ein fundarskrá fyriliggja
2. Bólkurin velur ein fastan orðstýrara og skrivara
3. Næsti fundur verður avtalaður á fundinum – Hvar og nær.
4. Fundirnir skulu hava hesa føst ásettu fundarskrá, ið er:
    a. Fundarfrágreiðing frá seinasta fundi
    b. Hvat skal felagið kunnast um
    c. Ymiskt

**Tagnarskylda**

Smb. Fyristingarlógini, hava øll starvsfólk tagnarskyldu.
*Smb. hesi lóg, hava starvsfólk ikki rætt til at fara út við persónligum upplýsingum og privat viðurskifti hjá børnum/brúkarum, um talan er um upplýsingar, sum starvsfólki hevur fingið í samband við starv sítt.*
Tað merkir, at ein kann viðgera ein trupulleika, uttan at navn verður sett á starvsfólk ella brúkara/børn talan er um.
Men samanumtikið hava starvsfólk – eins og allir aðrir borgarar í samfelagnum rætt til at úttala seg alment, eisini um sítt arbeiðsøki, men ansast skal eftir, at starvsfólk ikki brýtur tagnarskyldu sína og ikki gevur almenninginum ta fatan, at hann úttalar seg vegna stovnin.

**Orðstýrarin** hevur ábyrgd fyri
- at øll koma til orðanna
- at orðaskifti er á siðiligum støði
- at fundartíðin verður hildin
- Skrivarin hevur til ábyrgd, at niðurstøður og avtalur verða niðurskrivaðar

*Pedagogfelagið skilar sær rætt til at seta fundirnar í álitisfólkabólkunum saman við regluligu álitisfólkafundinum.*